# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Framsýning í Riberhúsi



Í hesum døgum hava tær tríggjar Elisabeth Ellingsgaard – glarlist, Marita Guttesen - sniðgeving og Oddny í Lon – sniðgeving, felags framsýning í Riberhús.

Allar hava tær áður sýnt fram millum annað á Gluggaglæmu og í Norðurlandahúsinum. Felags fyri allar er, at tær fáa íblástur úr náttúruni og leggja dent á litsamanseting, snið og góðsku.

Framsýningin í Ribarhús er opin í tíðarskeiðnum 11. til 29. august, og er soleiðis opin:

Mánadag til fríggjardag 15 – 17.30, leygardagar 11 - 17 og sunnudagar 15 - 17.30.




Av tí at virksemið hjá Sansum er økt nógv, søkja vit ein dugnaligan ráðgeva.

Tú verður høvuðsráðgevi hjá nøkrum av okkara størstu kundum. Saman við kundunum og okkara dugnaligu starvsfólkum kemur tú at standa fyri nøkrum av størstu kampanjunum í Føroyum. Tað verður eisini tín ábyrgd at tryggja, at samskiftið, vit skapa fyri okkara kundar, er gott og tekur støði í mentanini og samleikanum hjá kundunum.

Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur hóskandi útbúgving, eitt nú eina kandidatútbúgving innan marknaðarføring ella samskifti. Tú hevur lætt við at samskifta við fólk, tú dugir væl at hugsa í heildarloysnum, hevur gott eyga fyri visuellum samskifti og natúrlig evnir fyri handli.

Sansir eru ein framfýsin samskiftisfyritøka við 33 starvsfólkum í fýra ymiskum londum. Vit skapa kunningar- og marknaðarføringsloysnir í tøttum samstarvi við okkara kundar. Førleika- og útbúgvingarstøðið hjá fólkunum á Sansum er høgt og spennir víða. Grundarlag okkara fyri støðugari menning og framburði er persónligt rásarúm, virðing fyri fjølbroyttum hugsunarhátti og stuðul til persónliga menning hjá okkara starvsfólkum.

Heldur tú, at hetta ljóðar spennandi, so eigur tú at søkja starvið. Vónandi verður tað tú, sum vilt skapa framtíðina hjá Sansum saman við okkum. Sjálvandi fært tú eina góða løn.

Umsóknir til starvið skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. august klokkan 16. Umsóknir skulu sendast við telduposti til Lenu L. Mohr á lena@sansir.fo ella Høgna Rasmussen á hognir@sansir.fo. Vinarliga viðmerk títt fartelefonnummar.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja til Lenu L. Mohr á tel 218370 ella Høgna Rasmussen á tel 220401. Vinarliga ring millum 15.00 og 18.00. Tú kanst eisini senda fyrispurningar við telduposti til Lenu ella Høgna.

SANSIR

Pf. Sansir
Dvørgastígur 7

Postmoga 1099
FO-110 Tórshavn

www.sansir.fo

# Nýtt yrkingasavn frá Valdemar á Løgmansbø




Valdemar á Løgmansbø hevur júst givið út nýggja yrkingasavnið "Spegilsmyndir"

Valdemar á Løgmansbø, ið kanska er mest kendur sum tónleikari, gav í vikuni út yrkingasavnið, "Spegilsmyndir"

Savnið er býtt upp í tríggjar partar við heitunum, Innansjónir, Líkindi og Sindr. Yrkingarnar eru heimspekiligar hugmyndir, ið verða lýstar bæði speiskliga, skemtiliga, hugvekjandi og romantiskt.

"Spegilsmyndir" er annað yrkingasavnið hjá Valdemar á Løgmansbø. Fyrra savnið, "Bátsbeinabjølgur brunnin", kom út í 2000.

"Spegilsmyndir" er givið út á egnum forlagi og er 64 bls.

Kápumyndin á "Spegilsmyndir" er endurprent av málningi hjá Valdemar á Løgmansbø sjálvum.

ave

## Upp á gólv í Øravík

Komandi vikuskiftið verður árliga og afturvendandi dansináttin, sum dansifeløgini í Suðuroy skipa fyri saman við Gistingarhúsinum við Á.

Dansað verður leygarkvøldið 18. august, og lagt verður fyri við borðhaldi kl. 19. Kostnaðurin er 180 kr. og fer tekningin fram hjá dansifeløgunum har suðuri ella í gistingarhúsinum.

Fyriskipararnir siga, at vanliga luttaka eini 150 fólk á árligu dansináttini, og tey sum koma norðanfjørðs, kunnu bíleggja sær gisting í gistingarhúsinum frammanundan.

Tey fýra dansifeløgini í Suðuroy eru: Sumbiar Dansifelag, Jómsvíkingar, Tvøroyrar Dansifelag og Suðuroyar Norðara Dansifelag.